Yrkisdepilin
Hoyvíksvegur 71
Postsmoga 3279
FO-100 Tórshavn

Saltangará 26. oktober 2009

**Hoyringsvar frá Føroya Handverkarafelag viðvíkjandi uppskoti til broyting í løgtingslóg um yrkisútbúgvinga**

Mentamálaráðið hevur 21. oktober 2009 sent út uppskot til løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, har endamálið við broytingini er at lækka afturberingina til arbeiðsgevarar fyri lønarútreiðslur til lærlingar meðan hesir ganga á skúla úr 75 niður á 60 prosent. Samstundis verður í viðmerkingunum víst á, at Mentamálaráðið framvegis ætlar at javnseta stuðulin til lærlingar við lestrarstuðulin.

Føroya Handverkarafelag vil hervið takka landsstýriskvinnuni fyri, at hon valdi at taka fyrsta uppskot sítt hesum viðvíkjandi aftur.

Til nýggja uppskotið er fyrst at siga, at tað er púra burturvið at sammeta okkara lærlingar við íslendskar og norskar lærlingar, vælvitandi at eingir føroyskir lærlingar fara til hesi londini at læra.

Vanliga sammetir Mentamálaráðið okkum við danskar næmingar, tí øll tann føroyska skúlagongdin er gjørd eftir donskum kunngerðum. Eisini verða tær donsku lesiætlanirnar brúktar í Føroyum, tí í flestu førum finnast ongar føroyskar lesiætlanir.

Nógvir føroyskir lærlingar koma eisini at taka skúlagongdina í Danmark, tí einki skúlatilboð er til hesar í Føroyum. Við nýggja uppskotinum koma hesir næmingar at vera nógv verri fyri enn teirra donsku floksfelagar, tí tað er dýrari fyri næmingin at taka skúlagongdina uttanlands.

Hugburðurin í lógaruppskotinum svarar ikki til ætlanirnar um at 90 % av fólkinum skal hava eina útbúgving í 2015. Umrødda uppskot byggir als ikki uppundir hesa ætlanina, og harnæst vil uppskotið eisini vera við til, at

føroyingar í nógv størri mun fara uttanlands at taka útbúgvingina, tí føroyska tilboðið als ikki stendur mát í mun við møguleikarnir uttan fyri Føroyar.

Nei, skulu broytingar gerast, latið okkum so heldur fáa eina skipan, ið líkist teirri donsku, har almennir stovnar og privatir gjalda inn í ein grunn, ið tekur sær av at rinda lønina til lærlingar undir skúlagongdini. Grunnurin kundi passandi verið umsiting av ALS. Føroya Handverkarafelag fer ikki at mótmæla, um ætlanin er at taka sjúkrarøktarfrøðingar í hesa skipan eisini.

Vinarliga

______________________

Henry Olsen, formaður